




# Góðu veljarar. Gott Føroya fólk



Val X

GVØÐBJØRG WEST
Fólkaflokkurin

Mín visión fyri framtíðina er, at Føroyar skulu verða eitt gott og trygt samfelag, og at vit skulu verða millum bestu lond at virka og liva í. Vit ynskja at Føroyar skulu verða eitt samfelag við sterkum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar sosialar skipanir tryggja øllum eitt virðiligt lív.

Øllum børnum og ungum skulu tryggjast góðir uppvakstrarmøguleikar, so tey trívast og mennast.

Børn og ung, sum vaksa upp upp í heimum við trupulleikum, t.d. orsaka av rúsdrekka, evnismisnýtslu, sosialum ella likamsligum harðskapi, kynsligum ágangi skulu fáa hjálp.

Visión 2015 sigur, at viðgerðarstað fyri børn í hava verið fyri kynsligum ágangi, skal setast á stovn.

Har vil eg siga at Felagskapurin Kris hevur lagt lunnar undir slíkan stovn. Eg vil virka fyri, at pengar skulu avsetast á fíggarlógini 2008, sum skulu nýtast til fyribyrging og ráðgeving.

**Seti X við lista A og vel eina kvinnu. Tykkara álit er okkara styrkið.**

# Tú hevur rætt, Gunnvør Hofgaard!



Val X

NITA NÆS
Javnaðarflokkurin
www.j.fo/nita+naes.html

Tað var ein viðkomandi viðmerking, sum Gunnvør Hofgaard, lesandi í Keypmannahavn, hevði í bløðunum. Tað er rætt, at politiski mynduleikin noyðist at steðga á og spyrja: Hvat slag av vælferð skulu vit hava í okkara oyggjasamfelagi. Vit vita øll, at vælferð er ikki = persónligt ríkidømi. Vit vita somuleiðis, hvussu vandamikið tað er, at hava politikarar við valdið, sum styrkja eina skeiva samfelagsgongd, har tað eru nøkur fá fólk sum koma at eiga og ráða í Føroyum.

Fólkavaldir politiakarar hava givið ávísum føroyingum loyvi til at tjena uppá ognir, sum vit øll eiga. So leingi vit hava flokkar og politikarar sum halda, at hesin politikkur er í fínasta lagi, so verður tað seinur dagur, at vit fara at síggja til broytingar sum veruliga skapa vælferð. Tí vit vita øll av royndum, at vælferðin ikki kemur av sær sjálvum.

Tvídrátturin um at nøkur vilja hyggja til Ísland og onnur til Danmark, er einans við til at útseta okkara egnu vælferð.

Eitt samfelag við 50.000 fólkum kann ikki ljósrita mannagongdir frá øðrum. Eg haldi, at tíðin er búgivn til, at vit sjálvi finna út av, hvat slag av vælferð og menning vit vilja hava. Vit síggja dagliga skilagóðar kronikkir frá vælútbúgvnum føroyingum, sum rættiliga hava fatur á rætta endanum.

Vit vita frá íslendsku vinum okkara, at vinnulívið har er sterkt og at íslendingar duga og tora at trúgva uppá m.a., at mentan kann gerast samfelagsvinningur, fær hon rætta grundarlagið at byggja á. Vit hava heilt víst nakað at læra úr Íslandi, men eg ræðist, eins og Gunnvør, tankan um, at unga familjan skal hava minst 4 inntøkur fyri at klára ein vanligan gaglig-dag, sum unga íslendska familjan noyðist. Vælferð er sanniliga eisini, at foreldur hava tíð saman við børnum sínum, kunnu sita og nana og lesa søgur, so framtíðar føroyska barnið hevur lært bindindi heimanifrá, so tað er búgvið at spæla í dagrøktini og búgvið at læra seg at lesa og rokna í skúlanum.

Javnaðarflokkurin hevur klár boð uppá, at trivni í arbeiðs-og familjulívi er ein týdningarmikil partur av framtíðar vælferðarpolitikkinum.

# Føroya maritima “Silicon Valley”



Val X

HANS ALBERT HANSEN
Valevni Sambandsfloksins

Inntøkurnar í samfelagnum skulu økjast fyri at tryggja eina vaksandi varandi vælferð. Hetta skal gerast við at leggja dent á útbúgvingarøki og serliga menna maritimu útbúgvingarnar.

Fiskivinnan og blokkstuðulin hava verði einastu fruminntøkur hjá Føroyum. Tær hava higartil fíggjað vælferðarsamfelagið vit kenna ídag. Tað er tó mark fyri, hvat man kan leggja á herðarnar á fiskivinnuni. Tí mugu vit skapa gróðrarlíkindir fyri nýggum útflutningsvinnum, ið kunnu lyfta vælferðarsamfelagið uppá næsta støði. Nýggju útflutningsvinnurnar verða vitunnarvinnur, har kravið til útbúgvingar verður stórt. Tí mugu vit leggja stóran dent á, at menna fólkaskúlarnar, miðnámsskúlarnar, studentaskúlar og tær hægru útbúgvingarnar.

Sum ein siglingartjóð eiga vit at taka støði í okkara givnu fyrimunum og førleikum, tá vit skulu skapa gróðrarlíkindir fyri nýggjum vinnum. Vit skulu leggja serligan dent á, at menna útbúgvingar innan maritima øki. Vit skulu miðja ímoti, at hesar gerast heimsins bestu. Føroyar skal gerast ein kraftdepil og heildarveitari innan maritimar útbúgvingar og aðrar útbúgvingar ið liggja uppat teimum. Føroyar hava fleiri fyrimunir fram um flestu tjóðir, tá tað snýr seg um tað maritima øki. Vit hava kanska heimsins mest krevjandi og tilvitaðu brúkarar tá tað kemur til skip, reiðskap, framleiðslu og líknandi. Vit hava “royndarstøðina”- havið, skipini og flakavirkini beint við. Vit skulu skapa tað føroyska “Silicon Valley” innan maritima øki. Fyri at røkka hesum, skulu vit menna og seta á stovn skúlar og stovnar innan havlívfrøði, verkfrøði og framleiðslutøkni. Gransking innan havstreymar, fiski- og trygdarreiðskap. Umframt hettar eisini skipara og navigatørútbúgvingarnar og maskinmeistaraútbúgvingarnar, logistikk og shipping. Eisini eigur gransking innan aldu og vindorku af fara fram og annað ið náttúrliga hoyrir til.

Hesir stovnar og skúlar eiga at liggja saman og samstarv skal verða millum teir soleiðis at samanrenning verður millum fakbólkarnar. Á hendan hátt skapar man gróðrarlíkindir fyri at nýggj hugskot kveikjast og nyggjar vinnur kunnu koma undan kavi.

Vi skulu tora at hugsa víðari og bróta út úr siðbundna hugsunarháttinum. Einans á hendan hátt geva vit samfelagnum eitt lyft.

At hugsa sær at gjørt íløgur fyri 650 milliónir í maritima depilin ístaðin fyri tunnlar og asfalt, so kom íløgan fleirfald aftur í øktum útflutningsvirði og tað kemur øllum tilgóðar.

Hetta skapar virðir og eina varandi vælferð fyri øll.

# Spurningar til umboð Sambandsfloksins í náttúru og umhvørvismálum á trapputingi

JAN SØRENSEN



leiðari
Havlívfrøðiliga
royndarstøðin (Biofar)

Tíverri kom eg nakað seint til áhugaverda tiltakið í Miðlahúsinum mikukvøldið (9. Januar), eftir at hava verið til hondbóltslandsdyst. Eg kom tó so mikið tíðliga, at eg hoyrdi ummrøðuna av korallum. Serliga var tað umboð Sambandsflokksins Bjarti Thomsen, sum gjørdi vart við seg, tá hann á ein heldur niðurgerandi hátt viðgjørdi málið.

Rætt hevur hann í at undirritaði ikki er nakar serfrøðingur í korallum, men hinvegin kenni eg heldur ongan annan føroying, sum er frægari. Kortuni vil eg meta, at einum ikki nýtist at vera serfrøðingur fyri at síggja keðiligu gongdina viðvíkjandi korallum.

Bjarti Thomsen vildi vera við, at greinin hjá Jón Brian Hvidtfelt um korallir var villeiðandi og ikki faktuell. Eftir at hava lisið greinina einaferð afturat, síggi eg tvey viðurskifti, sum kunnu vera villleiðandi

Lesarin heldur møguliga at koralløkini eru spísikamari hjá toski og hýsu (men tað stendur ikki í greinini).

At undirritaði ikki hevur roynt at kortleggja korall-økini, men hevur tikið samanum almennar upplýsingar, sum Fiskirannsóknarstovan hevur savnað.

Tey, sum hoyrdu Bjarta Thomsen, sótu eftir við eini kenslu av at korallir ongan týdning hava fyri fisk. Eg kundi tí hugsa mær at spurt Bjarta Thomsen, sum umboð fyri Sambandsflokkin í náttúru- og umhvørvismálum:

Hví hava trolarar oytt korallir, sum svara til umleið 8.000 km2 um korallir ikki hava týdning fyri fisk?

Um koralleiðirnar ikki hava týdning fyri fisk, er so nøkur orsøk til ikki at friða hesi øki?

Um koralloyðing verður mett sum burðardygg fiskiveiða? (samb.Kap 1, §2 í Løgtingslóg um vinnuliga fiskiskap)

Um bruttoframleiðslan av fiskaføði á koralløkjunum man verða størri við ella uttan korallir?

Um eftirgjørdar grynnur (artificial reefs, kunstige rev), sum tú vart talsmaður fyri, kunnu samanberast við funktionalitetin av korallum.

Annars kann eg leggja afturat greinini hjá J.B.H, at koralløkini eru fjølbroyttastu búøki (habitat) eg veit um í føroyskum øki (bæði á landi og sjógvi), og av somu orsøk vildi eg mett at koralleiðirnar áttu at staðið ovast á listanum yvir varveitingarverd øki, tá vit tosa um at varveita einar fjølbroyttar Føroyar. Eisini sambært Rio-sáttmálanum, sum vit hava bundið okkum til at halda.

Hvat heldur Sambandsflokkurin um tað?

Korallir binda CO2 og minka harvið natúrliga um CO2 útlátið.

Hvat heldur Sambandsflokkurin um tað?